Telefon: 311820 Fax: 314720 E-mail: post@sosialurin.fo

# Von Sydow gevst

SJÓNLEIKUR. Heimskendi svenski sjónleikarin Max von Sydow gevst nú við at spæla við í filmum.

Í eini samrøðu við amerikanska blaðið New York Daily News sigur hann, at bara penganeyð ella eitt serliga gott handrit kann fáa hann at broyta hugsan.

Max von Sydow byrjaði sum sjónleikari stutt eftir kríggið. Stóra gjøgnumbrotið fekk hann í filminum hjá Ingmar Bergman *Sjeynda seglið* frá 1957.

Eftir hetta spældi von Sydow í fleiri filmum hjá Bergmann, men í 1965 vóru boð eftir honum úr Hollywood. Síðani tá hevur von Sydow innspælt filmar í Svøríki, Danmark og USA.

Hann var í uppskoti til eina Oscar-virðisløn fyri sín leiklut í filminum Pelle Erobreren, sum Bille August leikstjórnaði.

Max von Sydow er sjeyti ára gamal, nú hann gevst við sjóneikarayrkinum.

# Jørgin Dahl um eina viku

TÓNLEIKUR. Fyrsta føroyska fløguútgávan í ár 2000 verður við einum gomlum kenningi.

Jørgin Dahl úr Klaksvík ger comeback eftir tónleikaliga tøgn í yvir 16 ár. Í 70-unum og fyrst í 80'unum var hann ein sentralur persónur í føroyskum tónleiki.

Hann gekk undan við at gera føroyskan rocktónleik, og hann hevur skrivað so frægar sangir sum *Komið øll við, Me and Virginia* og *Breaking my Heart*. Hesin seinasti sangurin var í eini atkvøðugreiðslu í Sosialinum kosin at verða besti føroyski poppsangurin.

Jørgin Dahl hevur verið búsitandi í Danmark síðani miðskeiðis í 80-unum, og hesa tíðina er einki tilfar hjá honum útkomið í Føroyum.

Nú ger tiltikni tónleikarin comeback, og nýggja fløga hansara (sum er tann fyrsta í hansara egna navnið) kemur út komandi fríggjadag.




**Soleiðis sær kápan á nýggju fløguni hjá Jørgen Dahl út. Tað er listarmaðurin Oliver við Neyst, sum hevur gjørt hana**

# Bókarok

BØKUR. Ein nýggj bók eftir fyrrverandi pressustjóran hjá danska konservativa fólkaflokkinum hevur havt rok við sær.

Niels Krause-Kjær, sum í dag er lærari á Danmarks Journalisthøjskole, hevur skrivað eina bók um tíðina, tá hann var pressustjóri í flokkinum.

Bókin er ein sokallað lykilsøga, sum við dulnevnum greiðir frá veruligum hendingum og persónum.

Konservativi fólktatingslimurin og vinnulívsmaðurin Jens Heimburger ætlar at leggja sak ímóti Krause-Kjær, tí persónar í bókini líkjast ov nógv veruligum persónum í konservativa flokkinum.

– Eg kann sum vinnulívsmaður ikki góðtaka, at eg verið lagdur undir at hava arbeitt við loyniligum grunnum, sigur Heimburger.

Eisini fyrrverandi floksskrivarin Peter Sterup, hóttir við eini rættarsak, eftir at Krause-Kjær afturvísti kravinum um, at staðfesta at loyniligu grunnarnir í bókini eru íspunnir.

– Eg havi fingið íblástur frá veruligum hendingum, men hetta er skaldskapur, sigur Krause-Kjær, sum ikki vil tosa um teir loyniligu grunnarnar, sum flokkurin í bókinum hjá honum hevur undir hond.

# Beverly Hills í søguna

SJÓNVARPSRØÐ. Kenda amerikanska sjónvarpsrøðin Beverly Hills 09210 fer nú í søguna.

Eftir 10 ár á skíggjum kring allan knøttin hevur sjónvarpsstøðin Fox avgjørt, at fleiri partar skulu ikki gerast.

Beverly Hills hevur mist nógvar hyggjarar farnar árið, og tað sigst skyldast, at fleiri av teimum sjón–leikarunum, sum vóru við frá byrjan, ikki longu spæla í røðini.

Onkrir av teimum, sum framvegis eru við, ætla at gevast, og tá hyggjaratølini samstundis ganga skeiva vegin, hevur Fox valt at seta punktum fyri áður so væl umtóktu røðini, sum eisini hevur verið at sæð í føroyskum sjónvarpi.

**Subject:** Teldubræv
**Date:** Fri 28. jan. 2000
**To:** post@sosialurin.fo
**From:** birgir@mail.tele.dk
**Reply to:** birgir@mail.tele.dk

TELDU-POSTURIN

# Kristnihald undir Nyrup

Nú hava vit vant okkum at skrivað tveytúsund. Soleiðis. Ein viðurkenning av teirri tíðarrokning, ið tekur støði í føðing Krists. Við slíkt høvi eru mong, ið grundað yvir hugtakið *tíð*. Og tá serliga í útlegd. Salvador Dali letur tíðina smelta í oyðuni, Michael Ende sigur hon býr í hjartanum, svikandi lygnari Martin A. Hansens sigur hana grógva í landslagnum. Tí vaskar hann rútin í skúlanum.

Og so William. Stjørnuskaldið undir Varða, sum eisini gjørdist eitt tíðartekin her niðri á flatlondum, nú hann aftur spurdi *"Hvat er tíð?"*. Gævið eg var eins realistiskur og Eyðun Andreassen, at eg hættaði mær at telja árini, ið eftir eru. Soleiðis í meðal. Men havi altíð hildið útvarpsandlátini verið so óhugnalig. At eldast og hoyra tølini fække, meðan dagur dettur av degi. -*Tí hvat er tíð?*

Tá vit skrivað tveytúsund, er tað ikki einans ein viðurkenning av føðing Krists. Seinnu helvt av hesum drúgva skeiði hava vit latið kristnanini. Eitttúsund ár. Rubb og stubb.

Í hugvekjandi grein Eyðuns her í blaðnum tólvta január, ilskast hann inn á nýggjar røddir, ið hava tikið sær sess í føroysku kirkjuni. Rætt sum eitt fimmhundrað ára afturhvarv. Ikki aftur í 60'ini, men miðøldina.

Á hægsta tingi Ríkisins her niðri, hava menn — og serliga kvinnur — eisini leitað aftur til miðøld og tíðina innan modernitetin og hugsjónir Galileos. Við kristnani í hond vil Pia Kjærsgaard støðga multietniska samfelagnum. Her og nú. Vápnið er kristnilæran í skúlunum. - Vit vænta ikki at standa einsamøll í hesum kravi, sigur hon tólv dagar inni í nýggja árinum, tá boðið varð til kjak undir heitinum »Danmarks kulturelle udvikling set i lyset af den stigende islamisering«.

Hópur av skúlabørnum høvdu leitað sær inn um tingsins gátt henda dag, so trupult var at fáa sess. Men við hegnigum lærarum, fingu bæði hvít og minni hvít skúlabørn høvið at fylgja við í sprøkluta kjakinum. - Vit vilja styrkja kristni í skúlanum, eins og danskt og søga nú skulu raðfestast. Islamiseringin skal støðgast, segði næstformaðurin hjá Piu í danska menniskjaflokkinum.

Samstundis sær nýstovnaði felagsskapurin *Nydanskere* dagsins ljós. Í eini rámandi lýsingarherferð síggja vit svarta skúlanæmingin, sum stillisliga hugleiðir við danska borðið »Tá eg verið stórur vil eg verða hvítur. So kann eg blíva skúlalærari«.

Danski flokkurin hjá Piu øsir seg upp í skúm fyri spyrjandi eygum barnana og kunnger, at nú skal øll tilger av halalkjøti bannast og kommunur skulu ikki sleppa at lata fittar muslimskar gentur skifta og baða fyri seg, tá tær gera fimleik. Tær skulu fara vátar til hús, vilja tær ikki baða sum hini. Spurin eygu. Bann skal eisini verða sett fyri at byggja stórar moskur, eins og eingir frídagar uttan teir kristnu skulu galda í komandi tíðum, og nýfødd skulu bert skrásetast í fólkakirkjuni.

Danski politiski flokkurin hjá Piu, sum fær alt størri undirtøku, vil við grundlógini § 4 og 6 í hond, tryggja sær, at kristnin og fólkakirkjan ikki á nakran hátt viknar í Danmark nú og komandi. Í kristiliga systirflokkinum leggja tey eina við, at kristnin og donsku virðini nú skulu styrkjast. Mentamálaráðharrin loftar kjakinum: »Den voksende globalisering giver behov for en tænksom og reflekteret åbenhed«.

Skúlabørnini kveita at klokkuni. Fýra tímar eru farnir. Tey leitað sær uttar, undrandi yvir parlamentarisk viðurskifti, bonaðu gólvini og luktin á Tingi. Komin heim, kunnu tey eins og tjóðin øll stytta sær um stundir við Morten Korch á skýggjanum.

Og alt hendi hetta undir januárjøkuli javnaðarmanna.

- Hvagar fer tíðin?

**Birgir Kruse,**
**Keypmannahavn**

post@sosialurin.fo



## FØÐINGAR

19. desember 1999 fingu Jakobina og Bárður Niclasen, Keypmannahavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 4024 gr.

12. januar fingu Malvina og Nils J. Absalonsen, Viðareiði, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4200 gr.

16. januar fingu Sóleyð og Dánial P. Jensen, Saltangará, eina dóttir. Hon var 49 cm. long og vigaði 2870 gr.

19. januar fingu Lív og Tummas Magnussen, Norðragøta, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3950 gr.

19. januar fekk Annika Joensen, Skopun, eina dóttir. Hon var 49 cm. long og vigaði 2950 gr.

19. januar fingu Hansa og Eirikur á Húsamørk, Leirvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

20. januar fingu Jóhan F. Nystrøm og Diana Kristensen, Kollafjørður, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 3350 gr.

20. januar fingu Helena og Kjartan Jacobsen, Vestmanna. ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3475 gr.

20. januar fingu Anna Nygaard og Helgi Solmunde, Kambsdal, eina dóttir. Hon var 50 cm. long og vigaði 3350 gr.

21. januar fingu Agnetha Carlsson, Leynar og Bárður B. Nielsen, Saltangará, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 3455 gr.

21. januar fingu Unnie Justinussen og Guðmundur Guðmundsson, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 57 cm. long og vigaði 4800 gr.

22. januar fingu Marita og Páll Sigvald Øre, Fuglafjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3250 gr.

22. januar fingu Jórun og Knud Simonsen, Kvívík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4350 gr.

22. januar fingu Paula og Høgni Høgnesen, Strendur, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3250 gr.

22. januar fingu Anja og Eyðun Eliassen, Trøllanes, eina dóttir. Hon var 56 cm. long og vigaði 4400 gr.

23. januar fingu Laura Therkildsen og Bogi Dam Jacobsen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 4100 gr.

23. januar fingu Inger Andreasen og John Simonsen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3350 gr.

24. januar fingu Marita W. Sigurðsson, Klaksvík og Jógvan Vilhelm, Kunoy, ein son. Hann var 46 cm. langur og vigaði 2400 gr.

24. januar fingu Trina og Sámal Hansen, Horsens, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3630 gr.

## ANDLÁT

20. januar:
**Sunnuvá Petersen,** Skálavík, 89 ár
21. januar:
**Kathrina Neshamar,** Fuglafjørður, vanliga nevnd Dinna 78 ár
**Anna Sofía Joensen,** Søldarfjørður, 99 ár
**Kári Hovgaard,** Tvøroyri, 27 ár
**Katrina Midjord,** Hovi, 80 ár
22. januar:
**Sámal Jákup Joensen,** Norðragøta, 86 ár
**Reinar Dam,** Tórshavn, 59 ár
**Betty Andreasen á Høvdanum,** Strendur, 90 ár
**Schumann Didriksen,** ættaður úr Havn, búsitandi í Reykjavík, 71 ár
23. januar:
**Jona Jacobsen,** Tvørábakka, Tvøroyri, 84 ár
**Niels Pauli Ziskasen, Hvalba, 79 ár**
**Jákup Pauli Tausen**, í Vági, 83 ár
24. januar:
**Viggo Johannesen,** Sandavágur, 87 ár
**Janus Jacobsen,** á Viðareiði, 95 ár
25. januar:
**Elsa Hansen,** Leirvík, 89 ár

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 4. sunnudag eftir trettanda

*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10.00,
*Kunoy:* kl. 12.00, altarg.,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Mikladalur:* kl. 12.00, altarg., Hans Eiler Hammer
*Christianskirkjan:* kl. 11.00, lestur
*Havnar kirkja:* kl. 11.00, skriftamál kl. 10.40, altarg., Sverri Steinhólm
*Nólsoy:* Sonja Klein
*Vesturkirkjan:* kl. 11.00, altarg., Bergur D. Joensen
*Viðareiði:* kl. 12.00, Meinhard Bjartalíð. (Talvan gongur fyri føroysku Sjómanskirkjuna)
*Rituvík:* kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech
*Kvívík:* kl. 12.00, Martin Restorff Jacobsen
*Kollafjørður:* kl. 12.00, Uni Næs
*Miðvágur:* kl. 12.00, altarg., David Johannesen
*Hellurnar:* kl. 12.00, altarg.,
*Funningsfjørður:* kl. 16.00, altarg., Peter O. K. Olofson
*Sumba:* kl. 12.00, altarg., Elsa Funding
*Tvøroyri:* Petur M. Rasmussen
*Sandur:* kl. 12.00, Høgni Poulsen

### Frá Ebenezer
Sunnudagin kl. 12.00 sunnudagsskúli, kl. 18.00 evangeliskt møti og kl. 21.00 útimøti. Mánadagin kl. 20.00 bønarmøti.

### Tórshavnar Hvítusunnusamkomu
Sunnudag morgunmøti kl. 11. Kl. 12.15. Sunnudagsskúl. Kl. 18 Evangeliskt møti.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli og kl. 19.00 er møti.

### Meinigheitshúsið í Havn
Missiónsvikan heldur fram vikuna út, til sunnudagin 30. januar. Í kvøld kl. 20.00 talar Regin Høgnesen trúboðari, Leirvík og Manskórið í Meinigheitshúsinum syngur. Sunnudagin verður familjumøti kl. 14.00, vanligt møti kl. 18.00 har Regin Høgnesen, Leirvík, talar og streingjakórið í KFUM og K í Klaksvík syngur. Kl. 21.00 verður so bjóða til eitt eftirmøti har bólkurin Gittit luttekur. Øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 06.00 morgunbøn, kl. 17.00 landsbøn, í morgin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 11.00 morgungudstænasta, kl. 18.00 møti, kl. 22.00 útimøti (um viðrar), mánadagin kl. 06.00 morgunbøn, kl. 20.00 bønarskúlin

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla, kl. 14.00 sunnudagsskúli, kl. 17.30 er bøn og kl. 18.00 møti har Harald Haraldsen o.a. verða við. Mánakvøldið kl. 20, bønarmøti hjá Elly og Louis Durhuus, Brattalíð 15. Verið øll hjartaliga vælkomin. Vit eru við í tiltakinum frá »Minus til Pluss«.

### Frelsunarherurin í Tórshavn
Sunnudag kl. 11.00 Halgunarmøti, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti.

### Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 17.00 møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoma v/ Johnny Johannesen. Evni: Jákupsbrævið. Týsdagin kl. 16.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Missiónshúsið í Nólsoy
Møti verður fríggja- og leygarkvøldið kl. 20.00 og sunnudagin kl. 16.30. Talarar eru Niklas Mikkelsen og Ámund Bertholdsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Hvalvíkar Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, sangmøti kl. 18.00 og ungdómsmøti kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Nebo, Toftir
Sunnudagin kl. 18.00 verður fundur á Svangaskarði. Levi Joensen og aðrir úr Klaksvík tala og kórið syngur.

### Runavík
Møti verður leygardagin kl. 19.00 v/ Martin Olsen. Húsmøti verður týsdagin kl. 20.00, í Gøtu hjá Gerdu.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús, sunnudagin kl. 17.00 møti við Jóan Paula Jacobsen o.fl. Barnamøti kl. 17.

### Leirvík, Fuglafjørður og Gøta
Felags ungdómsmøti verður í Leirvíkar missiónshúsi í kvøld kl. 20.00. Bergur D. Joensen og sangbólkur ur Klaksvík luttaka. Eisini verður lovsangur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14.00 er sunnudagsskúli, kl. 19.00 Møti, kórið syngur.

### Sands Missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og sunnukvøldið kl. 18.00 verður møti við Jens og Nimrod. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið, Porkeri
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20.00. Ung av Argjum hava møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betel, Vágur
Sunnudagin: Breyðbróting kl. 11.00. Sunnudagsskúli kl. 13.30 og Evangel. fundur kl. 18.00.
Mánadagin: Bønarfundur kl. 20.00.
Ónsdagin: Uppbygg. fundur kl. 20.00.

### Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.
Telefonandaktin svarar á 373777.

### Kristiligur fundur í Odense
Kristiligur fundur verður við Svenningi av Lofti leygardagin 5. februar kl. 16.00 í Metodistkirkjuni, Alexandragøtu 8, 5000 Odense C. Nærri fæst at vita hjá Árna Helmsdal, tlf. 65 96 13 73.

### Møti í Zionskirken
Sunnudagin 30. januar kl. 15.00 verður møti í Zionskirkens songhus við John Petersen.

## Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 29. jan.:* Pól Johs. í Horni, tlf. 444038
*Sunnudagin 30. jan.:* Kári Rasmussen, tlf. 447010

**Norðoyggjar:**
Jaspur Petersen, tlf. 456400

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

**Tannlæknavakt,** Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.

## *Eitt ljós á gøtu míni*



*4. sunnudag eftir trettanda er teksturin úr Matt. evang. 14, 22-33.*

So long tíðin fellir, tá ið vit mugu bíða heilt til fjórðu náttarvøku. Og er tigandi róður tungur, so er vandamikil sigling ræðandi.

Men hann hevði ikki gloymt teir. Hann var uppi í fjøllunum og hevði eyguni eftir teimum har teir í náttarmyrkrinum í vónloysi andøvdu í óveðrinum. Tað stendur í Sálmi 121 um Guð, at hann blundar og svevur ikki. Tað eru slík orð, vit strika undir og sum vit krøkja okkum til í bølamyrkri, og tá ið brotini leggja seg yvir lítla bát okkara. At vera kristin er ikki tað sama sum at hava eitt tryggingarskjal, sum tryggjar móti lívsins ódnum; men tað er at hava frið við Guð í stormi og í logn. Tað stendur støðugt fast: Hann hevði ikki gloymt teir.

Og hann kom ikki ov seint. Tað kemur hann ongantíð. Vit fata ikki hví, hann drálar. Men alt sær øðrvísi út tá ið tað verður sæð úr erva, og tað hendir, at bíðitíðir verða til búningstíðir. Ezekiel var royndur, fyri at Guð kundi kenna alt, sum búði í bjarta hansara. Tað var ikki straffur, men uppaling. Tað er við vilja, at ørnin sleppur ungum sínum, tá ið teir skulu læra at flúgva. Orka teir ikki, er hon við tað sama har fyri at bera teir á sterku veingjum sínum.

Havsins øgiligu bylgjur kunnu ikki forða honum. Hann er Guð eisini tá ið støða okkara er vónleys. Tí siga vit sum hin gamli útróðrarmaðurin í eini bygd á vesturstrondini í Danmark. Harri, havið er so stórt, og bátur mín er so lítil. Nú setist eg við árarnar og royni at gera tað, eg kann. Tak tú um róðrið og stýr trygt í havn!

Amen!

**John S. Myllhamar, trúboðari**